**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 1334.**
**Tíðarskeið: 31/7-14/8 - 2013**

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Petur Steingrund, Mourits Mohr Joensen, Luis Ridao Cruz, Jens Arni Thomassen, Regin Kristiansen (fyrru viku) og Lis Larsen (seinnu viku).

**Ábyrgd:** Petur Steingrund.

**Endamál:** Hetta var fyrri túrurin av yvirlitstrolingunum á heysti í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt varð vekt, tal og longdarbýti skrásett fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini vórðu magakanningar gjørdar av toski, hýsu og upsa, umframt av øðrum fiskasløgum. Hitin í sjónum varð máldur við miniloggarum.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m.

**Um túrin:** Fóru av Havnini hóskvøldið 1. august kl. 20. Vegna vind av landnyrðingi fóru vit vestur um Sandoynna at royna. Tóku allar støðirnar vestanfyri, og fóru síðan suður á Munkagrunnin. Fóru at landa mikudagin 7. august í Havn og fóru síðan suður aftur á Munkagrunnin og tóku støðir norðureftir eystanfyri. Landaðu týsdagin kl. 14 í Havn. Tilsamans vórðu 141 hál tikin, og av teimum vóru 133 góðkend. Veðrið var so ógvuliga gott allan túrin.

**Prøvataking:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Tal av nytrum var eftir ætlan fyri øll fiskasløgini tosk, hýsu og upsa.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 14. august. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 1. november.

**Fyribilsúrslit:** Eitt sindur meira var at fáa av toski (26 %) og hýsu (28 %), meðan tað var eitt sindur minni at fáa av upsa (12 %, Talva 1). Nógv meira var at fáa av makreli, rossamakreli og sild. Onkrar sildir vóru komnar nær gýting (Talva 1). Nógv var av smáum svartkjafti vestanfyri og sunnanfyri. Sum nakað nýtt var nærum eingin smáur hvítingsbróðir fingin, men nógv av stórum hvítingsbróðri. Annars verður víst til túrfrágreiðingina fyri túr 1336, har úrslit fyri allan landgrunnin eru víst. Magakanningarnar vístu, at tað var sera lítið til av nebbasild. Vit fingu eina hákelling (havkall) og hann hevði etið tvær brosmur. Hitin við botn lá vanliga millum 7 og 11 ºC.

**Talva 1**. Veiða, og nytrur (aldrar) og magar tikin á túri 1334.

| FISKASLAG | KG í 133 hálum í 2013 | Nytrur | Magar | KG í 200 hálum í 2012 | KG per hál 2013/2012 |
|---|---|---|---|---|---|
| UPSI | 15118.170 | 887 | 192 | 25829.231 | 0.88 |
| HÝSA | 8136.034 | 874 | 179 | 9552.238 | 1.28 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 7854.908 | | | 10279.485 | 1.15 |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 7279.984 | 5 | 5 | 7072.560 | 1.55 |
| TOSKUR | 5422.046 | 805 | 193 | 6476.985 | 1.26 |
| SVARTKJAFTUR | 5302.218 | 69 | 5 | 8492.588 | 0.94 |
| MAKRELUR | 3536.712 | 46 | | 971.610 | 5.47 |
| LONGA | 2679.867 | 10 | 6 | 3791.769 | 1.06 |
| ROSSAMAKRELUR | 2504.550 | | | 402.643 | 9.35 |
| GULLLAKSUR | 1825.387 | | | 7574.158 | 0.36 |
| HAVMÚS | 1039.666 | | | 719.352 | 2.17 |
| TRANTKONGAFISKUR | 974.476 | | | 517.943 | 2.83 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 969.073 | | | 2078.666 | 0.70 |
| HVÍTINGUR | 896.918 | | | 667.441 | 2.02 |
| KNURRHANI | 622.551 | | | 396.751 | 2.36 |
| SVARTKALVI | 594.438 | 15 | 10 | 439.120 | 2.04 |
| BROSMA | 464.543 | | | 470.836 | 1.48 |
| TUNGA | 450.175 | | | 522.125 | 1.30 |
| HÁKELLING | 393.099 | | 1 | 0.000 | |
| SKRAMBUL | 355.772 | | | 518.802 | 1.03 |
| HAVTASKA | 328.316 | | | 236.952 | 2.08 |
| REYÐSPRØKA | 275.760 | 7 | 7 | 473.104 | 0.88 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 254.118 | | | 160.072 | 2.39 |
| SILD | 249.957 | 49 | | 9.633 | 39.02 |
| SILVURMURTUR | 249.806 | | | 856.176 | 0.44 |
| BLÁLONGA | 213.233 | | | 593.587 | 0.54 |
| SKØTA | 136.585 | | | 78.550 | 2.61 |
| KALVI | 118.200 | 2 | 2 | 205.095 | 0.87 |
| LOLIGO | 107.268 | | | 142.884 | 1.13 |
| SANDSPRØKA | 102.344 | | | 103.849 | 1.48 |
| LÍTLA BROSMA | 102.058 | | | 135.583 | 1.13 |
| HALAHVASSA SKØTA | 87.600 | | | 19.630 | 6.71 |
| TINDASKØTA | 83.135 | | | 180.003 | 0.69 |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 80.115 | | | 129.475 | 0.93 |
| LÁLLA | 72.855 | | | 99.739 | 1.10 |
| HVASSASPREK | 37.991 | | | 46.962 | 1.22 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 36.845 | | | 41.864 | 1.32 |
| GLASKVOYSA | 30.731 | | | 30.850 | 1.50 |
| BUKSVARTI HÁVUR | 26.772 | | | 9.642 | 4.18 |
| STEINBÍTUR | 19.919 | | | 7.835 | 3.82 |
| LÝRUR | 11.305 | | | 101.015 | 0.17 |
| BLÁGÓMUR | 10.555 | | | 35.250 | 0.45 |
| GLÝSUFISKUR | 5.644 | | | 12.180 | 0.70 |
| ELEDONE | 5.564 | | | 7.616 | 1.10 |
| JÁKUPSSKEL | 4.050 | | | 26.317 | 0.23 |
| HUMMARI | 0.700 | | | 1.242 | 0.85 |
| HAVNEBBASILD | 0.646 | | | 0.426 | 2.28 |
| MURRIKRUTT | 0.484 | | | 0.168 | 4.33 |
| KLINGRUSKØTA | 0.397 | | | 16.583 | 0.04 |
| GESTFISKUR | 0.292 | | | 0.000 | |
| BLÁRIDDARI | 0.170 | | | 0.513 | 0.50 |
| STREYMSILD | 0.139 | | | 4.880 | 0.04 |
| BLETTUTUR FLOYFISKUR | 0.095 | | | 0.000 | |
| NEBBASILD | 0.049 | | | 0.007 | 10.19 |
| TILSAMANS | 69074.285 | 2769 | 600 | | |

**Viðmerkingar:** Ongar.

Petur Steingrund